ÚTLENDINGURIN



# Rabah fann li

- Tað fyrsta, eg varnaðist, vóru mongu litirnir í tykkara landi. Eg vónaði í mínum stilla og heldur óttafulla sinni, at mongu litirnir reflekteraðu tykkara lyndi, so tað eisini var pláss fyri mær. Tað sigur 44 ára gamli Rabah Benbakoura úr Algeria, sum hevur búð í Føroyum síðani 1998. Í samrøðu við Sosialin greiðir hann m.a. frá, hvussu hann upplivdi, at tað eisini var pláss fyri honum í fremmanda landinum í útnorði



ÚTLENDINGURIN
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

– Vinmenn mínir úr Belgia góvu mær eitt ár. Onkur helt fyri, at eg kanska fór at klára heili tvey. Men ikki meir. Teir ynsktu mær góðan túr til Alcatraz (amerikansk fangaoyggj, blðm.) og bóðu meg senda teimum postkort av paradísisku pálmunum og strondlívinum á tropisku oynni, sigur hann flennandi.

44 ára gamli Rabah Benbakoura, sum er úr Algeria, men rýmdi úr heimlandinum til Belgia við familju síni longu sum tvey ára gamal, flutti til Føroya í 1998. Hann hevði ongantíð verið í landinum fyrr og visti heldur einki um Føroyar.

Hann dylur ikki fyri, at hann var óttafullur, tá hann á fyrsta sinni setti sín fót á føroyska jørð, tí alt var honum fremmant. Fara tey at taka ímóti mær? Hvat fara tey at hugsa um mín myrka húðarlit? Um mín samleika sum afrikanari? Spurningarnir vóru nógvir, tá kvinnan í hansara lívi, Ruth Fjallsá úr Tórshavn, hevði yvirtalað hann at geva Føroyum ein møguleika.

## Fremmandar Føroyar

Men síðani 1998 hevur hann gjørt vinmenn sínar so dyggiliga til skammar. Nú hevur hann verið í sjey ár í tí landinum, sum hann og vinmenn hansara ikki funnu í atlasinum, tá Rabah skuldi vísa teimum, hvagar leið hansara gekk.

Og við konu og trimum børnum hevur hann í Kovalág í Havn fingið sítt egna heim upp at standa. Fyrstu trý árini var hann á fyritøkuni El-Mek, og síðani 2001 hevur hann arbeitt sum elektrikari hjá SEV.

Og hann er skjótur at fara upp í kórið av teimum útlendingum, sum Sosialurin seinastu seks vikurnar hevur sett stevnu, og slær fast, at hansara skeptisku tankar yvirfyri nýggja og fjarskotna landinum skjótt vórðu punkteraðir.

– Eg kom til Føroya við tí lyfti frá Ruth, at vit kundu flyta aftur til Belgia, um eg ella vit ikki trivust í landinum. Alt var fremmant, og eg visti ikki, hvat eg fór í holt við. Eg eri franskttalandi og dugdi illa enskt, og málið var tí eisini ein trupulleiki. Men lyftið frá Ruth havi eg ikki brúk fyri í dag, tí eg trívist í Føroyum. Landið er trygt og gott fyri míni børn at vaksa upp í. Eg havi eitt arbeiði, sum mær dámar sera væl, og sum heild njóti eg lívið í Føroyum, slær 44 ára gamli Rabah fast.

So tá alt kom til alt, var talan als ikki um nakra fangaoyggj.

## Borgarakríggj í heimlandinum

Rabah Benbakoura er føddur í 1960, og hetta var sama árið, sum Algeria fekk fullveldi eftir hundrað ár sum franskt hjáland. Eftir hart stríð og nógvar samanbrestir vórðu fraklendingar riknir úr landinum.

Tá fraklendingar vóru horvnir, íkom samstundis eitt stórt tómrúm. Viljin til vald varð so sterkur millum ymsu bólkarnar í Algeria, at borgarakríggj skjótt herjaði. Kommunistarnir, vígongdu muslimarnir, nationalistarnir, stuðlarnir hjá franskmonnum og demokratarnir royndu allir sítt ítarsta at koma til valdið, og mong fólk lótu lív í samanstoytunum. Millum annað mammubeiggi Rabah, sum varð skotin av vígongdum muslimum.

– Pápi mín hevði eitt inniligt ynski um eitt betri lív, og hann tók avleiðingarnar av ófriðinum og rýmdi úr Algeria. Vit kundu ikki fara til Fraklands, tí eftir drúgva stríðið millum Frakland og Algeria vóru algerskir íbúgvar ikki væl dámdir í Fraklandi. Vit máttu so finna eitt annað fransktalandi land, sum so gjørdist Belgia, greiðir Rabah frá.

Familjan kom til Belgia, og foreldrini komu skjótt á arbeiðsmarknaðin og vóru før fyri at forsyrgja sínum børnum. Eftir loknan fólkaskúla fekk Rabah sær útbúgving sum múrari. Hann arbeiddi sum múrari í nøkur ár, áðrenn hann fór at lesa til arkitekt. Men eftir tvey ára lesnað skifti hann kós og fullførdi í staðin útbúgving sum elektrikari. Og skjótt stovnaði hann egið virki og gjørdist sjálvstøðugt vinnurekandi elektrikari.

– Eg megnaði at skapa mær eina góða tilveru í Belgia, men eg arbeiddi sanniliga hart fyri tað. Hesi árini vóru hørð og strævin, minnist Rabah aftur. Spurdur, um tað ávirkaði hansara lív at vera tilflytari úr Afrika, nikkar Rabah samtykkjandi.

– Sum tilflytari merkti eg altíð, at eg skuldi avrika nakað eyka og prógva mítt virði. Talan var ikki um nakra ógvusliga rasismu, men kortini eru tilflytarar í eini støðu, sum ger, at teir fyrst mugu bróta niður nakrar fordómar, áðrenn teir kunnu kenna seg væl, sigur Rabah.

Hann sigur, at hetta upplivdi hann øll árini í Belgia, men hann leggur afturat, at partvísi illviljin, sum belgiarar høvdu móti útlendingum, var av teirri einfaldu orsøk, at har vóru alt ov nógvir tilflytarar.

– Eg var ein teirra, og eg skilji væl, at fólk á ein ella annan hátt gerast skeptiskt, tá fremmandafólk floyma inn yvir teirra land, sigur Rabah álvarsamur.

## Rýmdi við Ruth

Lívið sum sjálvstøðugt vinnurekandi gjørdist skjótt ov strævið fyri Rabah. Hann sigur, at hann hevði heilt einfalt ov nógv at gera, og frítíðin var minimal. Tí fann hann sær nýtt arbeiði á einum hotelli í Bruxelles. Ein tilvildarligan dag í 1996 hitti hann eina føroyska kvinnu við navninum Ruth, sum var og vitjaði systir sína í belgiska høvuðsstaðnum.

Og har var einki at fara skeivur av. Rabah hevði funnið sína kvinnu, og eftir eitt ár saman í Belgia fluttu tey til Føroya og giftust eisini sama árið. Sum áður nevnt var hann skeptiskur um at flyta, men í dag er vent í holuni.

– Tað fyrsta, eg varnaðist, vóru mongu litirnir í tykkara landi. Húsini vóru málað í alskyns litum, og hetta var ein sjáldsom sjón hjá einum menniskja, sum bert er vant við gráa stórbýin. Eg minnist, at eg í mínum stilla og heldur óttafulla sinni vónaði, at mongu litirnir reflekteraðu tykkara lyndi, so tað eisini var pláss fyri mær, sigur Rabah Benbakoura.

Skjótt fann hann útav, at tað eisini var pláss fyri honum. Hann greiðir frá, at hann kallaði nýggja land sítt fyri "The Rainbow Country" (Ælabogalandið), og í sama viðfangi insisterar hann uppá at senda eina heilsan til sína verfamilju.

– Fyrstu tíðina var eg sjálvandi mest saman við nýggju familju míni, og verfamilja mín var fantastisk. Tey tóku ímóti mær við opnum ørmum, og tey fingu